Herfølge omanfyri strikuna

Fáur roknaði við, at tað skuldi eydnast hjá Jákupi Mikkelsen og teimum at seta oddaliðið upp á pláss

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Í seinasta dystinum undan vetrarsteðginum eydnaðist Herfølge loksins at vinna

Tá dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð í síðsta superligu dystinum undan vetrarsteðginum minti rómurin á Herfølge stadion ikki sørt um tað, sum var at síggja, tá Herfølge spælararnir saman við viðhaldsfólkunum fyri einum hálvum ári síðani fegnaðust um, at teir høvdu vunnið meistaraskapin.

Ta ferðina tók tað eina heilt góða løtu, áðrenn spælararnir fóru undir tak. Teir fóru sigursrundferð kring vøllin, og teir tveittu troyggjurnar út til áskoðararnar.

Mánakvøldið fóru spælararnir aftur sigursrundferð. Teir høvdu ikki vunnið meistaraskapin, men teir tóktust sera fegnir. 3.372 áskoðarar vóru møttir hetta vetrarkvøldið. Nógvir teirra vóru viðhaldsfólk hjá Brøndby. Tey smoygdu sær skjótt avstað. Herfølge viðhaldsfólkini vóru standandi. Tey fingu troyggjur, og Jákup Mikkelsen tveitta málmanshandskarnar, har sum klaksvíkingarnir í útlegd stóðu.

At Herfølge fólkini fegnaðust soleiðis komst av, at teir høvdu vunnið á oddaliðnum. Brøndby hevði longu undan seinasta dystinum tryggjað sær at halda vetrarfrí á fremsta plássinum. Herfølge var næstaftast. Tað var neyðugt hjá teimum at vinna fyri at lyfta seg upp um strikuna fyri at geva pláss fyri AB undir strikuni. Herfølge vann 3-2, og tað var eingin ivi um, at sigurin var uppiborin.

Sigurin var tann fyrsti hjá Herfølge, síðani teir 10. september á útivølli í Gladsaxe vunnu 3-1 á AB.

Gott undirhald

Hóast vøllurin var hálur og óslættur, og tað var kalt á Herfølge stadion, so høvdu áskoðararnir nógv at gleða seg um. Tað var ferð á, tað vórðu skorað fimm mál, og tað vóru fleiri spentar støður frammanfyri málið hjá Brøndby.

Stóri spælarin í Herfølge var álopsmaðurin Thomas Christiansen. Fyrrverandi spanski landsliðsmaðurin, sum er uppvaksin á Eysturbrúgv í Keypmannahavn, og sum hevur spælt í Barcelona, áðrenn hann umvegis Grikkaland í summar endaði í Herfølge, skoraði tvey mál, og hann var ein sannur snillingur við bóltinum. Krúnan á avrikinum var, tá hann í besta Maradona stíli spældi álopsfelagan, Chris Hermansen, leysan við vinstrabeinssending. Hann hevði vinstra beinið aftanfyri hitt beinið, tá hann avleveraði.

Thomas Christiansen setti hol á longu í 2. minutti, tá hann var snildisliga spældur leysur í vinstru og sendi framvið Mogens Krogh. Í 29. minutti javnaði toppskiúttin í superliguni, Peter Graunlund. Um brotsparksspblettin og millum fleiri viðspælarar og mótstøðumenn tamdi hann langan skrábólt og sendi í kassan aftanfyri Jákup Mikkelsen.

Níggju minuttir seinni sá tað út til, at Brøndby skuldi fara við øllum stigunum. Ruben Bagger drønstútaði innlegg úr høgru frá Søren Colding í málið. Jákup hevði ikki møguleika at røkka út til innleggið, og hann hevði ikki møguleika at bjaga stútaranum.

Í næstsíðsta minuttinum undan steðginum tiltuskaði Thomas Christiansen sær eitt brotsspark, sum Chris Hermansen, ið var væl betri upplagdur, enn hann var fyrr í heyst, setti í málið.

Í 47. minutti skoraði Thomas Christiansen sigursmálið. Hann samanspældi við álopsfelagan Bo Henriksen og var púra leysur stutt úr málinum.

Toppliðið útbrent

Serliga í 2. hálvleiki var yvirvágin hjá Herfølge sera sjónsk. John Faxe Jensen mundi hava givið sínum monnum ein orduligan uppsang í steðginum. Herfølge spælararnir tóktust hava meiri at spæla fyri, enn spælararnir hjá Brøndby tóktust at hava. Teir á heimaliðnum vunnu flestu nærdystirnar, teir fluttu seg betri, teir vóru skjótari á bóltinum, og við at hava tríggjar spælarar heilt har frammi megnaðu teir alla tíðina at leggja trýst á verjuna hjá Brøndby, sum hevði stórar trupulleikar, og so at siga ikki megnaði at takla mótstøðumenninar.

At Herfølge yvirvágin var so stór í 2. hálvleiki hevði við sær, at Brøndby møguleikarnir vóru fáir og smáir. Tí hevði Jákup Mikkelsen so at siga ongar møguleikar at vísa, hvør dugur var í honum, tá tað ráddi um bjargingar. Sum dysturin leið, vóru teir í Herfølge mest áhugaðir í at varðveita leiðsluna. Teir spældu ofta aftur til málverjan, og enn eina ferð vísti Jákup Mikkelsen, at hann er ein fínur fótbóltsspælari.

Herfølge sigurin hevði við sær, at hýrurin var góður, nú spælararnir fóru í vetrarfrí. Eftir nýggjár fara teir at fyrireika seg til seinna partin av kappingini og til stríðið, sum skal til, um endastøðan skal verða meiri sannførandi, enn støðan er í vetrarsteðginum. Kanska var sigurin á Brøndby fyrsta stigið á tí leiðini.

Støðan, danska superligan

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1. Brøndby	18	10	-	3	-	5	46	23	23	33
2. Silkeborg	18	8	-	8	-	2	27	23	4	32
3. Viborg	18	9	-	4	-	5	31	18	13	31
4. Lyngby	18	10	-	1	-	7	30	32	-2	31
5. FCK	18	8	-	6	-	4	30	16	14	30
6. FCM	18	8	-	6	-	4	31	25	6	30
7. OB	18	8	-	2	-	8	29	23	6	26
8. AaB	18	7	-	4	-	7	28	30	-2	25
9. AGF	18	6	-	2	-	10	27	36	-9	20
10. Herfølge	18	4	-	5	-	9	23	37	-14	17
11. AB	18	3	-	7	-	8	24	29	-5	16
12. Haderslev	18	1	-	4	-	13	18	52	-34	7

Sogndal farið undir nýggja kappingarárið

Julian og Kurt skulu á venjingarlegu í La Manga í vikuni undan landsdystunum ímóti Luksemburg og Russlandi

NOREG
Jóannes Hansen

Í fótbóltsfelagnum í Sogndal í Noregi er tað vorðið gerandisdagur aftur. Eftir nógva fagnaðin í sambandi við uppflytingina til tippuliguna og eftir ein kærkomna hvíld í ein mánað, fóru teir í føroyska felagnum í norskum fótbólti í fyrradagin undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Setningurin verður fyrst og fremst at varðveita plássið í bestu deildini. Fyrsta umfarið í landskappingini verður 16. apríl, og fram til tá ætla teir í Sogndal ikki at liggja á løtu síðuni.

Julian Johnsson, sum komandi ár skal spæla í troyggju nummar 14, og Kurt Mørkøre, sum skal bera troyggju nummar 16, hittust í fyrradagin saman við liðfeløgunum í Sognahallen. Har skemtaðu teir sær eina løtu, áðrenn teir høvdu spælarafund. Í dag og í morgin verða spælararnir kannaðir fyri, hvussu stóran – sum teir siga – skaða teir hava fingið av frítíðini, og mánadagin verður av álvara farið til verka.

Skulu vit meta út frá ætlanini, sum er løgd, so ætla teir í Sogndal at spenna bogan høgt í fyrireikingartíðini. Longu 7. januar skulu teir spæla venjingardyst í Sognahøllini ímóti Lillestrøm, og millum mangar aðrar venjingardystir skulu teir 25. januar spæla ímóti Rosenborg.

Nógv ferðing

Føroyska fótbóltslandsliðið skal 24. mars spæla HM undankappingardyst í Luksemburg og 28. mars skulu Føroyar spæla í Russlandi. Ætlanin er, at landsliðið skal fyrireika seg til hesar dystirnar á venjingarlegu, men vit hava ikki enn fingið at vita, nær henda venjingarlegan verður.

Tá tað snýr seg um venjingarlegur undan kappingarbyrjan, er spurningurin altíð, hvussu venjingarlegan hjá landsliðnum og venjingarlegurnar hjá feløgunum passa saman.

Julian Johnsson og Kurt Mørkøre vóru báðir fyrst í oktober í landsliðsferðalagnum í Sveis. Tá spældi Julian við, meðan Kurt allar 90 minuttirnar sat á beinkinum. Tað man lítið vera at ivast í, at tá HM undankappingardystirnir tørna fyri seinnapartin í mars, tá verður brúk fyri bæði Juliani og Kurt inni á vøllinum. Tá vera teir í betri dystarvenjing, enn mangir av hinum landsliðsmonnunum. Umframt í einari rúgvu av venjingardystum heima í Noregi, so fara teir í Sogndal at fáa dystarvenjing á venjingarlegu í La Manga í Spania. Har skulu teir í tíðarskeiðnum 10.-18. mars taka lut í kapping saman við norsku feløgunum Strømgodset, Lyn og Start og saman við fýra svenskum feløgum.

Ólavsøkufinalan er aftur farin at spøkja

Í fleiri fótbóltsfeløgum eru tey av tí áskoðan, at tað eigur at verða spælt í landskappingini fyrrapartin av juli

LØGMANSSTEYPIÐ
Jóannes Hansen


Ivamál tykist ikki vera um, hvørt steypafinalan skal spælast á Tórsvølli ella ikki. Spurningurin er heldur, nær hon skal spælast

Kongstankin hjá fleiri fótbóltsáhugaðum hevur í nógv ár verið, at finalan í kappingini um løgmansteypið skal verða spæld í Gundadali á ólavsøku. Higartil hevur hetta ikki verið gjørligt, men nú verður aftur tosað um møguleikan. Fótbóltssambandið skal tosa við tey bæði stóru feløgini í høvuðsstaðnum um, undir hvørjum treytum tað ber til at spæla finaluna á ólavsøku.

Tað eru B36 og HB, sum eiga rættin til fótbólt á ólavsøku. Inntøkurnar frá ólavsøkufótbóltinum hava verið stórar. Men tey seinnu árini hevur áhugin fyri ólavsøkufótbóltinum ikki verið so stórur, sum hann onkuntíð hevur verið.

Summarfrítíðin

Leygardagin høvdu umboð fyri fótbóltsfeløgini og umboð fyri Fótbóltssambandið árliga fundin, har farna kappingarárið varð eftirmett, og har tosað varð um møguligar broytingar komandi kappingarár.

Ein av spurningunum var, nær tað er rættast at hava summarsteðg. Sambært uppskotinum, sum feløgini undan fundinum høvdu fingið um tíðarætlan fyri komandi kappingarár, so skal síðsta umfarið í landskappingini undan summarsteðginum spælast sunnudagin 24. juni. Sambært somu ætlan skal finalan um løgmanssteypið vera sunnudagin 1. juli.

Á fundinum leygardagin, har øll fótbóltsfeløgini uttan Skáli og TB vóru umboðað, kom fram, at fleiri eru áhugaðir í, at tað verður spælt í landskappingini eitt sindur longur út á summarið. Víst var á, at tað ikki eitt sindur tvørligt, at spælararnir ikki vita rættuliga, nær teir hava summarfrí. Feløgini stremba eftir at koma í steypafinaluna, men hjá teimum, sum tað eydnast at røkka so mikið langt, ber tað við sær, at summarfrítíðin verður útsett.

Tí mæla fleiri til, at finalan verður flutt til eftir summarsteðgin, og tað er í tí sambandinum, at møguleikin fyri at spæla á ólavsøku aftur er komin upp á tal.

Søgan

Síðani tað í 1989 var farið undir kappingina um løgmanssteypið, hava allar finalurnar verið í Gundadali. Tey fyrru árini varð spælt á ovara vølli, men finalan í ár var á Tórsvølli. Ætlanin er, at finalurnar í framtíðini skulu vera á Tórsvølli.

Finalurnar vórðu nógvu tey fyrstu árini spældar fyrrapartin av august. Í 1998 varð avgjørt, at finalan skuldi spælast undan summarsteðginum. Sjónarmiðið aftanfyri avgerðina var, at í staðin fyri at markera byrjanina upp á seinnapartin av kappingarárinum, so skuldi finalan markera endan á fyrru helvt. Tað varð eisini roknað við, at fótbóltsliga støði fór at verða hægri síðst í juni, tá liðini vóru í góðari dystarvenjing, enn tað var fyrst í augst, tá feløgini ikki høvdu spælt týdningarmiklar dystir í einar seks ella sjey vikur. Finalan í 1998 var ímillum HB g KÍ, og HB vann 2-0 mikukvøldið 17. juni. Í fjør, tá KÍ vann 3-1 á B36, var finalan sunnudagin 4. juli, og í ár vann GÍ 1-0 á HB. Tað var á Tórsvølli sunnudagin 2. juli.

Nú verður tosað um at flyta finaluna. Um hon verður á ólavsøku hongur m. a. saman við, um FSF og havnarfeløgini finna fram til eina semju um fíggjarligu treytirnar.

Aftur ferð á hondbóltin

Tríggir dystir verða leiktir í bestu mansdeildini mikukvøldið, og millum annað verður spennandi at síggja, hvussu stór hóttanin frá Tjaldri er

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir at hava tikið sær av løttum um vikuskiftið – landsliðsvenjingin varð jú av ongum – leggja leikararnir í bestu mansdeildini aftur til brots í kvøld.

Hvar flýtur Tjaldur

Ein spurningur, sum hevur verið nógv umræddur seinastu tíðina, er, hvar Tjaldur í veruleikanum flýtur.

Síðani nýggju leikararnir, og har við eisini venjarin, komu til landið, hevur liðið rættiliga sett ferð á stigasavnanina. Møguliga eru útlit fyri fleiri stigum, tá Neistin kemur á vitjan, tí higartil hevur als ikki gingið eftir vild hjá føroyameistarunum. Móti VÍF fyri viku síðani vóru tó glottar at hóma í avrikinum, so alt talar fyri einum spennandi dysti, har vinnarin kann sleppa upp á fjórða plássið.

Hetta hevur H71 í løtuni, men eftir øllum at døma verða teir við undirlutan, tá teir mikukvøldið skulu royna seg í grannauppgerð móti Kyndli.

Kyndilsliðið hevur av álvara sett ferð á seinastu dystirnar, og halda teir framhaldandi sama støði, er lítið at ivast í, at tvey stig afturat bíða.

Seinasti dysturin verður í Vestmanna, har KÍF tekur ímóti StÍF. Strandingar hava tapt teir báðar seinastu dystirnar, men skulu teir halda fast um annað plássið, sum teir í løtuni hava, er einki at ivast í, at tvey stig skulu fáast til vegar her.

Kollfirðingar hava hinvegin fleiri ferðir bitið frá sær í vetur, og hóast stigini enn eru nakað fá í tali, so hevur tað fleiri ferðir verið heilt nær við. Millum annað á Skála, har StÍF sigurin bert var upp á eittans mál, so vissir í at vinna skulu strandingar á ongan hátt vera.


Spennandi verður at síggja, hvørt Kyndil framhaldandi fer at halda sama støði, sum teir hava gjørt seinastu vikurnar

Lokaluppgerð í Klaksvík

Ein dystur verður leiktur í meistaradeildini hjá kvinnum mikukvøldið

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Talan er um grannauppgerðina í Klaksvík, tá Mjølnir og Fossanes fara í KÍ-høllina mikukvøldið.

Hóast talan er um lokaluppgerð, so er lítið, sum bendir á, at talan verður um nakran spennandi dyst.

Fossanes eigur enn fyrsta settið í ár til góðar, og tá Mjølnir samstundis kappast við Drátt um fremsta sessin á talvuni, bendir alt á ein tryggan sigur til heimaliðið.

Støðan 1. Deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1. VÍF	9	9	-	0	-	0	303	218	85	18
2. StÍF	9	5	-	1	-	3	268	242	26	11
3. Kyndil	8	4	-	2	-	2	233	202	31	10
4. H71	8	3	-	0	-	5	214	228	-14	6
5. Neistin	8	3	-	0	-	5	188	206	-18	6
6. Tjaldur	9	3	-	0	-	6	205	275	-70	6
7. KÍF	9	1	-	1	-	7	198	238	-40	3